# Nýggj tvífløga við kvæðum, skjaldrum og kingosangi

**Franskt útgávufelag og Tutl geva í samstarvi nýggja tvífløgu út**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

"Traditional music in the Faroe Islands" er heitið á eini nýggjari tvífløgu, ið er komin út. Tvífløgan er útgivin í samstarvi millum føroyska plátufelagið Tutl og franska útgávufelagið Frémeaux & Assosiés, og verður at fáa til keyps í 32 londum. Á fløgunum eru tey ymisku sløgini av føroyskum traditionellum tónleiki - kvæði, vísur, tættir, skjaldur og kingosangur - umboðaði. Útgávufelagið Frémeaux stendur fyri sjálvari útgávuni og útbreiðsluni, meðan Tutl hevur staðið fyri tilrættisleggingini av ljóð-, teksta- og myndatilfarinum.

Flestu upptøkurnar á fløgunum báðum eru umvegis Útvarp Føroya fingnar til vega frá svenska útvarpinum, ið var við á eini felags norðurlendskari innsavningarferð í Føroyum í januar og februar 1959. Elstu upptøkurnar á fløgunum eigur Jógvan Gerðalíð, og tær eru við tjørnuvíkingum, ið syngja kingosálmar í 1950. Nýggjastu upptøkurnar eru gjørdar fyri fýra árum síðani.

Tilfarið er skipað á tann hátt, at upptøkur, har føroyskt mál verður nýtt (kvæði, tættir og skjaldur), eru á fyrru fløguni, meðan upptøkur, har danskt mál verður nýtt (sálmar og vísur), eru á seinnu fløguni. Ein bóklingur við frágreiðingum á enskum og fronskum máli fylgir við fløgunum.

Upptøkurnar við føroyskum kvæðum og tættum og donskum vísum eru gjørdar í dansi í Sumba, á Velbastað, Strondum, í Skálafirði, Nólsoy, Gøtu og Skálavík. Skjaldrini eru upptikin í Havn, Streymnesi og á Toftum. Upptøkurnar við kingosangi eru gjørdar í Klaksvík, Saksun, Gøtu, Streymnesi og á Strondum.

Jónheðin Tróndheim mastraði fløgurnar. Kári Sverrisson, Kristian Blak og Svend Højgaard løgdu útgávuna til rættis fyri Tutl og franska útgávufelagið.



*Nýggj tvífløga við millum øðrum Kingo, kvæðum og skjaldrum er nú komin á marknaðin*

# Møguliga tvífalt gull til Eivør


*Eivør hevur longu vunnið sær gullplátu fyri fyrstu útgávu sína, og spátt verður nú, at nýggja fløgan kann geva tvífalt gull*

**Fyrsta fløgan hjá Eivør varð seld í hópin av eintøkum í Íslandi, men nú verður roknað við, at nýggja fløgan, Krákan, verður seld í eini 10.000 eintøkum. Hetta er tvífalt gull og fáir íslendingar megna hetta**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyrsta fløgan hjá Eivør Pálsdóttir varð seld í 6000 eintøkum í Íslandi. 5000 eintøk gevur gull í Íslandi og fáar fløgur í Íslandi megna tað árliga.

Nú verður mett, at nýggja fløgan hjá Eivør, Krákan, verður seld í hópin av eintøkum og at steðgur ikki kemur í, fyrr enn eini 10.000 eintøk eru seld.

Jens Guð, føroyavinur og tónleikaserfrøðingur. dugir vanliga væl at meta um og hann fylgir væl við, og tá um føroyskan tónleik ræður, er hann rætti maðurin at spyrja. Og tað er hann, sum hevur gjørt metingarnar um sølugongdina .

Eivør hevur eftir stuttari tíð skapt sær eitt navn í Íslandi og hava Íslendingar tikið hana til sín. Tó er tað eitt bragd at selja so nógvar fløgur. Jens Guð undirstrikar, at serliga er hetta merkisvert, tí mong onnur stór nøvn hava ikki hesi sølutøl og nýggja fløgan er av slagnum, ið ein skal hoyra meira enn einaferð, áðrenn ein varnast, hvussu góð hon í veruleikanum er.

Krákan hevur ligið sum nummar 4 á íslendska sølulistanum farnu vikuna.

# Fíggjarnevndin úr at gera

**Næstformaðurin í fíggjarnevndini, Vilhelm Johannesen sigur, at enn er langt á mál við fíggjarnevndararbeiðinum, áðrenn fíggjarlógin verður klár til aðru viðgerð í løgtinginum**

FÍGGJARNEVNDARARBEIÐI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fíggjarlógin hevur seinastu vikurnar verið til umrøðu í fíggjarnevndini. Bæði formaðurin og næstformaðurin í fíggjarnevndini, Óli Breckmann og Vilhelm Johannesen, siga, at arbeiðið gongur sína gongd, men ásanna, at enn er langt mál. Umframt at viðgera sjálva fíggjarlógina, so hevur fíggjarnevndin úr at gera við øðrum málum.

Vilhelm Johannesen greiðir frá, at í løtuni eru níggju mál til viðgerðar í fíggjarnevndini, og tað darvar fíggjarlógararbeiðinum nakað. Nevnast kann, at bæði broytingar í skattalóggávuni og tolllógini eru í løtuni í fíggjarnevndini.

## Framvegis gjøgnumgongd

Vilhelm Johannesen hevur drúgvar royndir í fíggjarnevndararbeiði, og hann velur býta fíggjarlógarviðgerðina í fíggjarnevndini í tríggjar partar.

– Vit ganga fyrst ígjøgnum teir ymisku partarnar í fíggjarlógini. Síðan bjóða vit løgmanni, landsstýrismonnunum og pørtum frá vinnuni til eina hoyring, har vit kunnu seta teimum spurningar. Seinasti partur er politiska viðgerðin, har endaliga álitið frá fíggjarnevndini verður skrivað. Í hesum parti býtur fíggjarnevndin seg vanliga í ein minni- og meiri luta, greiðir næstformaðurin, Vilhelm Johannesen, frá.

Spurdur, um hvussu langt fíggjarnevndin er komin, svarar næstformaðurin, at fíggjarlógin verður framvegis gjøgnumgingin, so viðgerðin er ikki komin so langt. Gjøgnumgongdin verður væntandi liðug í dag, og síðan verður farið undir hoyringina.

Spurdur, um tað longu nú eru mál, sum limirnir í fíggjarnevndini eru ósamdir um, svarar Vilhelm Johannesen, at tað er alt ov tíðliga at tosa um nøkur stríðsmál, tí tey koma vanliga ikki fram í ljósmála fyrr enn politiska viðgerðin verður á skránni.

# Jólaboð komin

TÍÐINDI FRÁ BÓKADEILD KFUMS

Nú eru Jólaboð komin í bókabúðirnar.

Í bókini eru siðsøguligar greinir, yrkingar og søgur bæði upprunaligar og týddar.

Johanna Zacharia Hansen sigur frá minnum úr gomlum døgum: um skúlan, handlar, kornvelting, fyrireiking til jóla og ymsar aðrar hendingar, sum hon hevði upplivað ella hoyrt um.

Heri Tróndheim fer við okkum til Lorvíkar, har hann gevur okkum eina hugtakandi mynd av einum gomlum manni har í bygdini, sum hann ofta hitti.

Saman við Jesar Hansen uppliva vit jólini í Odense 1938.

Elin Dahl Johannesen letur okkum uppliva jólini á Dronning Alexandrines Hospitali fyri umleið 60 árum síðan. Eisini hoyra vit um arbeiðskorini á Hospitalinum, og hvussu doktar Dahl og arbeiðsfólkið, tó umstøður vóru ikki góðar, kortini megnaðu at fáa alt at laga seg á bestan hátt.

Johs. Andr. Næs fer út á sildaøkið við Føroyar, har Albert Victor var stødd hin 9. okt. í. 1954. Vit hoyra um Einar Thomsen, sum gjørdi tað bragd at bjarga tí 14 ára gamla Johan Paula Jensen úr Sumba, sum sló út av sluppini Albert Victor, men sum varð fingin innaftur í síðstu løtu.

Osmund Joensen og Ditlev Róin hava ferðafrásagnir úr Bayern og Nepal.

Jógvan Sofus Ferjá sigur frá sínum fyrsta túri til skips við Suðuroynni, sum Jóhan í Djónastovu á Eiði førdi.

Benny Drewsen hevur nakrar endurminningar, har hann m.a. skrivar um sín fyrsta túr við M/S Tjaldri hjá Skipafelagi Føroya í 1956.

Sigvald Kristiansen skrivar um Skallagrím – skálabátin, ið hvarv. Í 1935 hvarv Skallagrímur eina óveðursnátt á Skálafjørðinum, men ein mánað seinni varð hann á undurfullan hátt funnin aftur.

John S. Myllhamar hevur týtt sálmin hjá Grundtvig Giv mig, en salmetunge.

Annars eru sálmar, sum Kjartan Stakksund og Magnus Høgenni hava yrkt. Hesi hava týðingar í bókini: Effie Campbell, Ebba Skaalum, Torkil Beder, Bjarne Skaalum og Theodor Hansen.

Inngangin, Gleðiboð fyri alt fólkið, hevur Mejnhardt Hansen skrivað.

Kápumyndina, sum er av Landavegnum í Havn, hevur Høgni Würdig Larsen teknað, og Janus Dam Guttesen hevur teknað myndirnar í bókini. Men annars eru eisini nógvar fotomyndir.

Guttorm Zacharias hevur lagt Jólaboð til rættis.

Bókadeild KFUMs hevur sett bókina, Ívar Guttesen umbrotið og P/F Einars Prent prentað og heft.

Jólaboð eru 80 síður og kostar kr. 90,-



# Eiga at umhugsa at banna ungum við lóg at ganga úti um næturnar

**– Tað er ein veksandi trupulleiki at børn og blaðung ganga úti og vála mitt á nátt og eitt útigongubann við lóg er avgjørt vert at umhugsa, sigur Sjúrður Johannesen, sosialráðgevari hjá Barnaverndini í Havn**

ÚTIGONGUBANN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Setir løgtingið eina lóg í gildi, sum bannar børnum og ungum at ganga úti seinni enn eitt vist um kvøldið, kundi tað verið ein stór hjálp hjá nógvum foreldrum.

Tað heldur Sjúrður Johannesen, sum er sosialráðgevari hjá Barnaverndini í Havn.

Hann sigur, at tað er ein áhugaverdur tanki, sum Rúna Sivertsen reisti í Sosialinum í farnu viku, tá ið hon mælti til, at vit gera sum íslendingar og at Løgtingið setir eina lóg í gildi sum beinleiðis forbjóðar børnum og blaðungum at ganga úti seinni enn eitt vist um kvøldið.

Av tí, at Sjúrður Johannesen er sosialráðgevari hjá barnaverndini í høvuðsstaðnum er hann helst tann, ið veit mest um náttarlívið hjá børnum og ungum og hann hevur dagliga samrøður við ung og foreldur teirra um trupulleikar av kriminaliteti og um misbrúk av rúsdrekka, rúsevnum, sniffing og øðrum ólevnaði.

Hann sigur, at tað er sjón fyri søgn, at tað er er ein veksandi trupulleiki, at børn og ung ganga úti og vála um næturnar.

– At børn og ung ganga úti og mala um næturnar eru ein stórur trupulleiki. Og hann er veksandi.

Tí heldur hann, at eitt tankin sum Rúna Sivertsen setir fram í eini roynd at vinna á hesum trupulleikanum, er alt ov álvarsamur og áhugaverdur, til at hann kann verða kveistraður hann til viks, uttan at hann verður viðgjørdur bæði væl og virðiliga.

Í hesum sambandi sipar hann til Finn Helmdsdal, sum er sosialráðgevari og leiðari á Barnaverndini, sum helt, at tað er ein óhugsandi tanki at Løgtingið skal seta útigongubann í gildi fyri børn og ung.

– Tað er als ikki vist, at eitt útigongubann við lóg hevði loyst trupulleikan. Men tað hevði verið áhugavert hjá teimum fakbólkum, sum varða av børnum og ungum, at tikið spurningin til viðgerðar, sigur Sjúrður Johannesen.


*– Verður lóg sett í gildi, sum bannar børnum og ungum at ganga úti seinni enn eitt vist, kundi tað gjørt sítt til at varpa ljós á veruliga trupulleikan og at gjørt hann meiri sjónligan, sigur Sjúrður Johannesen, sosialráðgvari hjá barnaverndini í Havn*

## Ein hjálp til foreldrini

Sjúrður Johannesen er als ikki samdur við Finni Helmsdal í at eitt útigongubann er at taka ábyrgd frá foreldrum og myndugleikum.

– Eg vildi heldur mett hetta sum eina hjálp til foreldur og tey, sum annars vara av børnunum, tí verður útigongubann sett í verk, hava øll nakað ítøkiligt at halda seg til.

Tað kann eisini forða fyri, at mong børn og ung gerast offur fyri ti bólkatrýsti, sum mangan er.

Hann er sostatt heldur ikki samdur í, at tað altíð er tí at foreldrini svíkja, at børn og ung ganga úti og mala um næturnar.

– Børn og ung duga nógvar snildir, tá ið tað ræður um at sleppa út, uttan at foreldrini vita tað. Eitt nú er tað vanligt hjá ungum at sova hjá vinfólkum og tá er ikki altíð lætt hjá foreldrum at hava fult tamarhald á, hvat tey havast at.

Og Sjúrður Johannesen heldur, at bólkatrýstið skal ikki undirmetast.

– Tað kann verða ómetaliga trupult at nokta einum barni nakað, sum øll vinfólkini sleppa. Og tað kann vera ómetaliga trupult hjá einum einstaklingi í einum bólki at nokta fyri at royna rúsdrekka, rúsevni, ella at sniffa, tá ið øll hini í bólkinum royna tað.

Hann sigur, at hann veit nógv dømi um at eisini børn, sum hava foreldur, sum eru væl fyri og sum virka væl, ganga úti um næturnar og royna bæði eitt og annað, og tað tekur hann sum tekin um, at tað er ikki altíð lætt hjá foreldrum at vita, akkurát, hvar børnini eru, tí hetta eru púra vanlig ung.

Sosialráðgevarin hjá barnaverndini í Havn sigur, at var ein lóg sum segði, at børn og ung undir ein ávísan aldur, skulu vera inni eina ávísa tíð, høvdu øll havt greiðar linjur at hildið seg til.

– So er ábyrgdin í hvussu so er tikin frá teimum ungu, sigur hann.

Hann sigur, at so høvdu bæði foreldur og løgregla sloppið undan nógvum kjaki og parlamenteran aftur og fram við tey ungu, tí so hevði altíð borið til at sagt við tey ungu, at soleiðis er lógin tíverri, og so er onki at gera.

Hann heldur eisini, at vórðu greiðar reglar, hevði verið tað lættari hjá teimum ungu at góðtikið at verðið send til hús.

Men hann leggur afturat, at sjálvsagt skulu undantøk gerast, so at tað verður loyvt at ganga úti á Ólavsøku og kanska onnur kvøld við.

## Varpa ljós á veruliga trupulleikan

Sjúrður Johannesen, sigur, at tað er ikki vist, at tað skal vera løgreglan einsamøll, sum hevur ábyrgdina av hesum.

Hann kann eisini hugsað sær, at Náttarravnarnir taka lut í hesum arbeiðnum, ella kanska at tað kundi verðið gjørt upp á onkran heilt annan máta.

Hann veit heldur ikki um tað er rætt, at hetta skal vera ein tænasta til foreldrini, sum so. Tí vast hann í, um tað er rætt at børn og ung, sum verða tikin upp á gøtuni, verða koyrd heilt til dyrnar.

– So vítt, eg havi skilt í Islandi, er tað so, at børn og ung, sum verða tikin upp um næturnar, verða koyrd á ein ávísan stovn. Haðani verður so ringt til foreldrini, sum síðani sjálvi koma eftir børnunum. Tað eggjar eisini foreldrunum til at taka ábyrgd, sigur Sjúrður Johannesen.

– Men tann størsti vinningurin hevði kanska verið, at verður ein slík lóg sett í gildi, hevði tað varpa ljós á tann veruliga trupulleikan.

– Tað hevði kanska gjørt, at øll tey nógvu »vanligu« ungu, sum ganga úti um næturnar, men sum hava foreldur, sum virka væl, høvdu verið skild frá og høvdu verðið send heim. Hetta eru kanska tey mongu, sumeru úti, uttan at foreldrini vita av tí og sum koma eftir teimum, tá ið ringt verður.

Sostatt hevði tað verið lættari at fingið eyga á tey børn og tey ungu, sum veruliga hava trupulleikar og har heimini ikki virka og so kundi orkan verðið miðsavnað um tey.

## Mugu broyta hugburð

Annars heldur Sjúrður Johannesen at tað hevur stóran týdning at hugburð.

– Í Føroyum fara ung ikki í býin, fyrrenn eftir midnátt og halda so á til klokkan fimm ella seks.

– Tað, hann hevur skilt aðrastaðni, er vanligt at ung fara í býin um fimm, seks tíðina um dagin og fara til húsar klokkan tvey.

– Tað er ongin ivi um at ung undir 18 ár kunnu hava tað líka stuttligt í býnum frá kl 21.00 til 01.00 sum frá 24.00 til 05.00. Tað krevur bara at vit spakuliga venja okkara ungu til at soleiðis er náttarlívið tá ein ikki er myndugur og at nú er tað ein lóg, sum sigur, nær, tey skulu vera heima. Og so mugu dansistøðini innrætta seg eftir tí, sigur Sjúrður Johannesen.

Hann leggur afturat, at tað sigur seg eisini sjálvt, at ung, sum venda um upp á nátt og dag tvey samdøgur hvørt vikuskiftið, kunnu heldur ikki vera serliga væl uppløgd til dagsins gerning longu aftur mánadagin, so hetta ótálmaða náttarlívið er ósunt upp á nógvar mátar.

# Dómurin í málinum um Jákup Mørkøre góðtikin

**–Almannamálaráðið fer ikki at skjóta dómin í málinum um gamla leiðaran á Landssjúkrahúsinum, Jákup Mørkøre, inn fyri Landsrættin**

ÓLÓGLIG UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er tað endaliga staðfest, at tá ið Jákup Mørkøre varð leiðari fyri Landssjúkrahúsinum, var hann hvørki ólýðin ella óloyalur ímóti politisku skipanini.

Herfyri varð hann í Føroya Rætti fullkomiliga reinsaður fyri allar skuldsetingarnar, sum vórðu settar fram ímóti honum, tá ið hann varð sagdur úr starvi.

Og nú hevur Almannamálaráðið gjørt av at góðtaka dómin. Sostatt verður hann ikki skotin inn fyri Landsrættin og sostatt stendur hann eisini við.

Tað var í januar í 2000, at Helena Dam á Neystabø, sum tá var landsstýrismaður í heilsumálum, gav Jákupi Mørkøre sekkin sum leiðari á Landssjúkrahúsinum.

Í uppsagnarbrævinum segði hon, at Jákup Mørkøre varð bæði óloyalur og ólýðin ímóti politisku skipanini.

Ein onnur orsøk til uppsøgnina var, at Helena Dam á Neystabø helt, at hann var óegnaður at vera leiðari fyri Landsjúkrahúsið. Og ein triðja uppsagnargrund var, at hann hevði ikki evnini at samskifta við tey, hann skuldi samskifta við, eitt nú álitisfólk, fakfeløg o.s.fr. og tí skapti hann ótryggleika.

Hetta vildi Jákup Mørkøre ikki hava sitandi á sær og tí stevndi hann.

## Fekk viðhald í øllum

Føroya Rættur gav honum Jákup Mørkøre viðhald í øllum og rætturin vísir øllum skuldsetingunum frá Helenu Dam á Neystabø aftur.

Føroya Rættur kom til ta niðurstøðu, at Jákup Mørkøre var hvørki ólýðin ella óloyalur. Hann var heldur ikki óegnaður at verða leiðari og manglandi evnini at samskifta eru ikki prógvað, sigur Føroya Rættur.

Rætturin segði, at talan var um so álvarsligar, at tað var neyðugt at prógva tær og tað megnaði Almannamálaráðið altso ikki.

Tí varð niðurstøðan hjá Rættinum, at Helena Dam á Neystabø hevði ongar sakligar orsøkir til at siga Jákup Mørkøre úr starvinum og at uppsøgnin tí var ólóglig.

Almannamálaráðið varð sostatt dømt at viðurkenna, at viðurkenna, at Jákup Mørkøre var ikki ólýðin og óloyalur og at tað var skeivt, tá ið sagt varð í uppsøgnini, at hann hevur megnað at stjórna Landssjúkrahúsinum á nøktandi hátt.

Av tí sama varð Almannamálaráðið dømt at rinda Jákupi Mørkøre 60.000 krónur í endurgjaldi, og harumframt skal ráðið eisini rinda 40.000 krónur í sakarmálskostnaði.